## Sigfríður Clementsen:

# Eg eri venjari, ikki gandakallur



**FÓTBÓLTUR B36 kunngjørdi í gjár, at samstarvið millum B36 og venjaran, Sigfríð Clementsen, er stegðað. Sigfríður náddi sostatt bara at verða í felagnum í eitt gott ár, síðani hann koma aftur í fjør. Nýggjur venjari hjá B36 verður fyrrverandi venjarin hjá AB, Allan Mørkøre**

Tróndur Arge

– Vit halda at vit hava ein so mikið gott lið, at vit burdu ligið longur uppi á stigatalvuni. Tað er slett ikki fyri at taka nakað frá Sigríði Clementsen, hann er ein óalmindiliga góður venjari, men úrslitini mangla, sigur formaðurin í B36, Sámal Ímundarsson

B36 liggur í dag á einum á sætta plássi í Vodafonedeildini við 24 stigum. Tað eru sjey stig upp til triðjaplássi.

– Tað er væl møguligt, at liðið kundi fingið nøkur betri úrslit, men tú mást samstundis hyggja eftir hinum liðnum í landskappingini í ár. Tá vit samanbera liðini, so haldi eg ikki at B36 hevur eitt betri lið enn hini, sigur Sigfríður Clementsen.

Í tíðindaskrivinum, sum B36 sendi út, stóð at tað vóru vantandi úrslitini, ið eru orsøkin til venjaraskiftið. Er tað ongin djúpari orsøk til at venjaraskiftið er framt?

– Nei, tað kanst tú ikki siga. Tá tað ikki gongur eftir vild, so er tað altíð onkur, ið rópar upp. Soleiðis vil tað altíð verða. Tað er ongin djúpri orsøk til venjaraskiftið, vit hava havt eitt gott samstarv, men nú eru vit samdir um, at hetta gongur ikki longur. Vit vilja meira og síggja ikki nakra betring, sigur Sámal Ímundarsson.

B36 endaði í fjør á einum 8. plássi við 28 stigum. Teir vóru í hørðum tvídysti við KÍ um ikki at flyta niður. Hvat væntaði B36 leiðslan av árinum í ár?

– Vit høvdu vætnað av Sigfríði og leikarunum, at vit vóru væl nærri trimum teimum fremstu liðnum. Vit eru 6-7 stig frá tí málinum og tað eru bara 9 dystir eftir. Vit hava mist nøkur sera óheppin stig í einastuni og tí hava vit valt at gera sum vit gera, sigur Sámal Ímundarsson.

### Søgurnar sannar ella ósannar?

Tað hava fyrr í ár verið søgur frammi um, at Sigfríður skuldi frá sum B36 venjari. Sigfríður segði tá í samrøðu við Rás2, at tað nokk ikki var einki um tað, tá øll tosaðu um tað.

– Vit venjarar eru somikið loyalir, at vit tosa saman tá nakað hendir. Eg eri blivin informeraður um, at aðrir venjarar hava verið til samtalu til at yvirtaka starvið hjá mær. Tað er beikst, serliga tí at tað tá vóru bara spældir einir 14 dystir spældir og vit høvdu bara trý tap. Leiðslan hevur tó hildi, at tað var brúk fyri eini broyting og tað er løgið, tí eg var júst settur sum venjari og tú má ganga út frá, at tá ein venjari akkurát er settur, so er semja um at venjarin skal halda fram. Tað hevur vist nokk verið ein ósemja í leiðsluni hjá B36, at eg ikki skuldi verða venjari hjá B36. Hetta er so avleiðingin av tí. Tá avgjørdu vit, at tað leiðslan skuldi koma við eini avklåring uppá um eg skuldi halda fram ella ikki. Tann avkláringin kom ongantíð, men kanska skuldi eg bara verið steðgaður tá, sigur Sigfríður Clementsen.

Leiðslan í B36 vil ikki avsanna at teir hava havt samrøður við aðrar venjara, men teir avsanna, at Sigfríður skuldi frá. Spurdur um tað er nakað hald í søguni, um at Sigfríður skuldi frá, svarar Sámal Ímundasson so:

– Nei, tað er tað faktist ikki. Tað bleiv brunnið nógv tað eina tíðarskeiðið og tað kann sikkurt misskiljast Søgurnar hava í øllum førum verið yvirdrivnar, men meiningin var ongantíð at koyra Sigfríð.

### Eitt ár nóg mikið

Sigfríður Clementsen kom aftur til B36, sum hann vandi í 2005 og 2006, seint í kappingini í fjør. Tað vil siga, at Sigfríður hevur verið venjari hjá B36 í eitt gott ár, men er eitt ár nokk til at venda gongdini hjá B36?

– Eitt ár er slett ikki nokk, men vit høvdu væntað meira. Nú ljóðar tað sum um at vit geva Sigfríði allan skyldina, tað er ikki tað. Vit høvdu bara væntað nakað annað og okkara ynskir blivu ikki uppfylt, sigur Sámal Ímundarsson.

Sigfríður heldur ikki at tað er rættvíst, at hann er settur frá longu nú.

– Tað er einki sum eitur rættvísi í fótbólti, men eg haldi at eg havi fingið ov stutta tíð og hetta er ikki heilt "fair", men B36 er trýst frá ymiskum síðum. Tað tykist mær sum at B36 vildi hava meg at gera gand, men eg eri eingin gandakallur, eg eri ein fótbóltsvenjari, sigur Sigfríður Clementsen.

– Tað er harmiligt at samstarvið er steðgað, tí mær hevur dámt væl í felagnum og vil gjarna takka leikarum, hjálparfólkum og ikki minst áskoðarunum fyri tíðina í B36, sigur Sigfríður at enda.